Viðmerking:

# Løgmaður, gevst at spæla við Hoydal

*Ganga samráðingarnar væl- vinnur Hoydal, Ganga samráðingarnar illa — vinnur Hoydal eisini*



Fólkaflokkurin og Tjóðveldisflokkurin hava áhaldandi sagt føroya fólki, at Heimastýrislógin hevur ikki størri virði enn tað papírið, hon er skrivað á. Síðani síðsta val hava teir brúkt so at siga alla landsins umsiting til at siga tað sama.

Og hvat er so trupulleikin við Heimastýrislógini. Jú, siga teir, hon kann í fyrsta lagi takast aftur av dønum í morgin, um tað skal vera. Í øðrum lagi kann blokkurin eisini takast aftur. Men trúgva hesir menn og kvinnur tì, tey sjálvi siga? Tað gera tey als ikki, og her eru nøkur dømir.

Í síðsta valskeiði vóru útreiðslur landskassans til rentur umleið 500 mió.kr. Hetta var uttan at avdráttur var goldin. Finnbogi Ísakson fann útav, at tá ið avdráttur av umleið 6 mia. kr. ein dag skuldu gjaldast yvir kanska 20 ár, fóru avdráttirnir árliga at verða 300 mió.kr. Við øðrum orðum fóru rentur og avdráttir at líkjast tí upphædd, sum blokkurin var á tá.

Tí mælti F.Í. landsstýrinum til at taka upp samráðingar við donsku stjórnina um at hon skuldi átaka sær føroysku skuldina móti, at føroyingar fráskrivaðu sær blokkin. Hvussu kann Tjóðveldisflokkurin handla við nøkrum, sum tú fyri fólkinum sigur, at danir kunnu taka aftur í morgin?

Bjarni Djurholm úr Fólkaflokkinum vildi ikki vera verri enn F.Í., og mælti til at kapitalisera blokkin. Hetta fremmanda orðið merkti í stuttum, at danir góvu føroyingum nakrar milliardir her og nú, og av blokkinum skuldu danir so gjalda rentur og avdráttir av tí láni, sum teir høvdu tikið fyri at geva føroyingum hesa stófingnu milliarda gávu. Hvussu kann Fólkaflokkurin handla við nøkrum, sum hann sigur fyri fólkinum, at danir kunnu taka aftur í morgin?

Enki av hesum gekk- og einki av hesum fer at ganga. Og tað er av tí einfaldu orsøk, at blokkurin er ætlaður at fíggja ein part av teimum málsøkjum, sum danir sambært Heimastýrislógini hava ábyrgd av.

Og nú er bert ein trumfur eftir. Og tað er ST-samtyktin. Hendan samtykt skal hjálpa hjálondum til fullveldi, og sambært loysingarfólki passar hendan samtykt, sum fótur í hosu í viðurskiftunum millum Danmark og Føroyar. Og hendan samtykt skuldi tryggja okkum eina skiftistíð frá í dag og í minsta lagi fimtan ár fram.

Men Nyrup sigur fýra ár. Er tað so livandi galið at hann ikki kennir ST-samtyktina, ella snýr henda samtykt seg als ikki um lond, sum eru á hædd við okkum búskaparliga. Eg trúgvi tí síðsta, og um so er, hava tit ongan trumf eftir.

Eftir næsta samráðingarumfar eigur løgmaður at gera støðuna upp, og merkiligt skal tað vera, um hann ikki kemur til somu niðurstøðu sum eg: Tað loysir seg ikki at spæla við Hoydal.

**Sune Jacobsen**

# Feðgar á ferð — Ein einfaldur veruleiki

Nøkur menniskju hava tær merkisverdigu gávur, at tey hava so ótrúliga lætt við at foreinkla veruleikan uttan at kaga eftir, um nú niðurstøðurnar eru eftirfarandi og í tráð við veruliga veruleikan. Soleiðis pástanda feðgarnir báðir Høgni og Kjartan, at allur stuðul er av tí ónda og er orsøkin til allar "verðsins" ólukkur í Føroyum, fyri síðan at siga, at alt, sum er hent í Føroyum síðan 1948, og sum vit øll kunnu verða samd um ikki átti at verið hent, tað skyldast, at vit hava havt eina Heimastýrislóg og síðan 1988, at vit fingu ríkisstuðul úr danska ríkiskassanum.

Eg komi í hesum sambandi at hugsa um framúr góðu donsku sjónvarpssendingina Matador, har grísahandlarin Larsen hevði dresserað hundin Kvik til ikki at eta, um hann segði: "det er en tysker, det er en tysker."

Soleiðis verður nú ført fram av hesum báðum, at "tað er ein Heimastýrislógin, tað er Heimastýrisógin." Men ikki vænti eg, at føroyingurin verður so lættur at dressera, um tað er tað, tit ætla.

**Teir hava sæð ljósið**

Høgni Hoydal, landsstýrismaður hevði í næstseinastu viku eina grein við heitinum "Tað, sum vendir niður, vendir upp", og Kjartan Hoydal, fyrvverandi stjóri í fiskivinnuumsitingini hevði aðra grein í Dimmalætting við heitinum "Brennandi álop, men lítið sigandi".

Felags fyri báðar hesar greinar er, at rithøvundarnir báðir so staðiliga ávara allar veikar sálir ímóti at fara undir nakað, sum kann líkjast studningi frá tí almenna. Og tað er uttan mun til studning, sum vit vanliga kenna hann, ella um talan er um at brúka av danska ríkisstuðulinum. Og so fáa annars andstøðan og Kári Petersen, búskaparfrøðingur av at vita um ætlanir at halda fast um eina danska stuðulsskipan nevniliga ríkisstuðulin, hóast hvørki Javnaðarflokkurin og neyvan heldur Kári hava gjørt hetta til eitt mál í sær sjálvum, tvørturímóti.

Feðgarnir báðir eru samdir um, at teir nú hava sæð ljósið báðir tveir, og at teir tískil nú gera upp við tað, sum í hvørfall pápin stóð sum embætisligur høvuðseksponentur fyri, nevniliga eina óavmarkaða útgjaring av almennum studningskrónum. Í 1975 kom heildarloysnin, sum løgtingið tók undir við, men arkitektarnir aftanfyri vóru Petur Reinert, sáli og Kjartan Hoydal. Ráfiskagrunnurin var teirra uppfinnilsi. Hesin grunnur ella henda skipan hevur síðan útgoldið nógvar milliardir í studningi til okkara høvuðsvinnu. Í tíðarskeiðnum frá 1980 til og við 1990 góðar 3 milliardir krónur. Sama tíðarskeið kostaði okkum 1,6 milliardur krónur í mistum veðhaldum.

**Politisk endurføðing**

Tað er so í lagi, at menn gerast klókari við árunum, men eg havi eitt sindur torført við at foreina meg við hasa yvirfrelstu linjuna, sum báðir nú leggja fyir dagin. Bert teir sita inni við sannleikanum, og øll vit onnur ganga enn á tí breiða vegnum, sum førir til neyð og vesaldóm. Gott nokk veit eg, at man ikki kann vera eitt sindur upp á vegin, antin ert tú tað ella ikki, men hví gerast so kompromisleysur, sum hesir báðir feðgarnir nú eru?

Tað, sum í 80´unum var sannleikin, er í dag beint tað øvugta. Hvat er nú munurin at fara út av vegnum høgrumegin ella vinstrumegin? Kunsturin má hóast alt vera at halda seg á vegnum.

Høgni Hoydal vil gera tað til, at vit, sum enn viðurkenna okkum við ríkisstuðulin, vit hava gjørt peninganýtslu til eina politiska hugsjón. Kjartan Hoydal sáplar við júst somu atfinningum greinarøðina hjá Kára Petersen, búskaparfrøðingi niður í sand og øsku og vísir ístaðin til Hvítubók og ikki at gloyma nýliberalu katakismussina hjá Caragata.

Jú eg má partvís geva Høgna rætt í hasari yvirskriftini. Tað, sum vendir niður, vendir upp, tað mugu vit so staðiliga ásanna.

**Her lekur millum teori og praksis**

Men eru ikki allir politikkarar í Føroyum samdir um, at studningsskipanin, sum vit kendu hana, tá Kjartan Hoydal sat sum hægsti embætismaður í fiskivinnuni, er av tí ónda. Og er tað nakar politikkari í Føroyum í dag, sum aftur vil inn við almennum veðhaldum, lánum og rakstrarstuðuli til okkara høvuðsvinu? Eg kenni hann so ikki, so tit báðir nýtast ikki at gera tað til tykkara privatu og persónligu hugsjón, tí vit aðrir eru ikki ósamdir.



Forrestin fingu vit at vita í løgtinginum henda dagin, at landsstýrið hevur sanerað skuldina hjá trimum langfaraskipum, lagt veðhøld um til rentu- og avdráttarfrí lán , sum tað so vakurt eitur. Og landsstýrið, sum situr í dag, er Javnaðarflokkurin ikki partur av, meðan Tjóðveldisflokkurin við 8 tingmonnum er trygga parlamentariska grundarlagið eisini hjá Jørgen Niclasen, landsstýrismanni. So her lekur eitt sindur millum teori og praksis.

Og er øll studningsskipan av tí ónda, hví verður so ikki gjørt meira við at lúka út í verandi skipanum? Vit hava enn eitt ótal av studningsskipanum, eisinini rakstrartstuðli. Tað nyttar lítið at reypa um hasar 40 mill. kr, sum ikki blivu brúktar til endurnýggjan av fiskiskipaflotanum, tá man samtsundis letur næstan líka stóra upphædd út í saneringum til nøkur fá útvald skip, meðan onnur eitt nú South Island og nýggi Hvilvtenni ikki fáa inn eygað. Skuldu vit ikki miða eftir einum samfelag, har allir landsins borgarar eru eins fyri lógini?

Og var almenni studningurin til Sandoyarætlanina av tí ónda? Tað halda í hvørfall ikki sandoyingar.

**Hví ongantíð taka í egnan barm?**

Reyði tráðurin - soleiðis eitur tað nú einaferð - í hesum báðum greinum er, at vit for Guds skyld ikki mugu brúka burtur av ríkisstuðulinum til rakstur og viðlíkahald av føroyska samfelagnum. Hetta vil leiða okkum í fortapilsi við bæði hollendskari sjúku og kavarsjúku.

600 mió. kr. í yvirskoti á fíggjarlógini, tað er í lagi, um alt annað er í lagi, men tá blokkurin er uml. 1000 mió. kr., so tørvar tykkum framvegis 400 mió. kr. í at fáa allan blokkin á bók. So her má man siga, at „man pynter sig med lånte fjer.“

Taka vit so danskar tænastur í Føroyum við, so eru vit 700 mió. kr. frá málinum, tí tær saman við blokkinum eru uml. 1,3 mia. kr. Og enn liggja uttanfyri eitt nú stuðulin til okkara lesandi ungdóm í Danmark.

Og tá Høgni Hoydal vil vera við, at vit í andstøðuni hava gjørt peninganýtslu til eina politiska hugsjón, tí vit mæla til, at nøkur viðurskifti verða fingin upp á pláss, tá vendir hann, sum ikki einaferð, alt á høvdið. Men tað skerst tó ikki burtur, at nakrar av hasum krónunum, tit nú binda niður av ríkisstuðulinum, høvdu verið betur farnar til at viðlíkahildið nakað av hesum niðurpínda samfelagnum. Her eru alt ov nógv viðurskifti komin í drag. Tað er í lagi, at Høgni Hoydal listar øll politisku avrekini upp, sum hann sigur, teir hava nátt, men tað er nú einaferð ítøkiligu úrslitini, sum telja. Føroyingurin kann bert hyggja rundan um seg. Har gongur sjón fyri søgn.

Og at geva Heimastýrislógina skyldina fyri bæði líkt og ólíkt er púrastu burturvið, hóast vit uttan iva kunna semjast um, at hon langt frá er nøktandi. Men vit kunnu ikki gerast so sjálvrættvísir, at vit gloyma burtur egnu veruleikar.

**Lat okkum taka eina erliga uppgerð.**

Ríkisfelagsskapurin er ikki fyri okkum ein materiell uppgerð í krónum og oyrum. Var ríkisfelagsskapurin bert pengar og einki annað, hvat hevði tá trupulleikin verið hjá tykkum í samráðingunum at fingið eitt nú javnbjóðis rættindi hvør hjá øðrum? Nei, ríkisfelagsskapurin er eisini fyri danir nakað við felags ábyrgd, felags rættindum, felags skyldum og felags møguleikum.

Enn einaferð vil eg undirstrika, at eg havi stóra virðing fyri teimum loysingarfólkum, sum vilja hava loysing uttan mun til kostnaðin. Tað er ein erlig søk. Men eg kann ikki foreina meg við, at menn, sum tit báðir, royna at blaka fólki torvmold í eygað og siga, at alt, sum er nú, er av tí ónda, meðan tað, sum koma skal, har verður alt so sára gott, sjálvandi við tí fortreyt, at danir vilja gjalda. Hetta er hykl av ringasta slag.

Fyri okkum javnaðarfólk er tað eisini eitt mál, at vit gerast fíggjarliga óheftir av so væl danska ríkiskassanum eins væl og av útlendskum multinationalum fyritøkum. So hetta kunnu tit heldur ikki gera til eina eksklusivan „hoydalskan“ politikk.

Lat okkum taka eina erliga uppgerð, tað skylda vit eisini Føroya fólki.

**Jóannes Eidesgaard, løgtingsmaður**

## Astma- og allergifelagið hevur fundir í Havn og Klaksvík

Leygardagin skipar Føroya Astma og Allergifelag fyri fundi á Sjómansheiinum í Havn. Við á fundinum verður eisini kostráðgevi, sum fer at geva nøkur góð ráð. Fundurin verður frá klokkan 14.30 í tí, sum verður rópt Sigmundarstovu, og bjóðað verður kaffi, te og køkur.

8. juni verður líknandi fundur í felagshøllini á Klaksvíkar Sjúkrahúsi. Har fer ein barnalækni at verða við, og fundarfólkið fer at fáa møguleikan at spyrja hann spurningar.

Eftir hesi tiltøk fer nevndin í Føroya Astma og Allergifelag í summarfrí, men tey fara tó at hava ein telefonsvarara, har fólk kunnu leggja boð til nevndina. Hesin telefonsvarari kann røkkast á telefon 311419.

Tá latið verður uppaftur í september, verður tað í nýggjum hølum í MBF-húsunum.

Føroya Astma og Allergifelag varð stovnað í 1985 og í felagnum eru umleið 200 limir.



Viðmerking:

# Vælsignaðar várvóni

Ofta verður sagt og funnist at, at føroyingar ikki kunnu standa saman, men tað hevur hetta landsstýrið dyggiliga mótprógvað.

Hóast ákoyringarnar frá báðum bløðunum og partvís eisini frá loftmiðlunum hava verið støðugar og ógvusligar, samstundis sum tað eina stórmálið fyri og annað eftir skuldi loysast umframt fullveldismálið, livir landsstýrið við sítt fríska lív.

Hetta væntaði danska stjórnin ikki og ei heldur Javnaðarflokkurin í Føroyum. Javnaðarflokkurin hevði lyndi til at seta seg upp aftur á og lata blaðið koma við sínum dagligu ákoyringum. Eg minnist, at fleiri fólk, sum eg møtti, spurdu: »Hvussu leingi man Høgni Hoydal fara at halda til hetta« – »Hetta heldur hann ikki leingi til«. Men árið fór og einki munti. Javnaðarflokkurin fekk ábreiðslur frá veljarunum. Faldarin kom, men hann gjørdi hvørki frá ella til, og teirra »andstøðupolitikkur« verður neyðarsligari og neyðarsligari. Allur flokkurin hevur fingið Eidesgaard, sum Tóra Hjørleifsdóttir málber seg.

Teir liva av bara at finnast at, at tileinkisgera alt føroyskt, venda og snara sær higar og hagar, og einki kemur fram, hvat teir vildu gjørt um teir skuldu fingið maktina. Hvør skuldi verið løgmaður t.d.? (Tað plagdu teir at gera nógv burturúr). Eidesgaard? Edmund Joensen? Uttan mun til, hvat fólk velja, yppa tey øksl og verða foyð, um tú ber hetta upp á mál. Hóast tað nú verður sagt, at tað eru ikki pengarnir, sum binda okkum til Danmørk, hevur tað alla mína tíð verið høvuðsgrundgevingin fyri, at vit ikki kundu ráða okkum sjálvum. Tað var stórasleggja, sum varð ripað í høvdið og so varð hildið, at tað lirraði ikki eftir í tær. »Kom við einari milliard, so skal eg vera fyri loysing«, varð sagt.



Bæði Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin ikki so mikið sum nevna fyri sínum veljarum tann óreingiliga VERULEIKAN, at blokkurin verður tikin burtur, uttan mun til fullveldi ella ei. Sambandsflokkurin roynir at koma við tí, at tað er hetta landsstýrið, sum hevur skyldina. Teir hava gjørt danir fornermaðar. Barnsligt, sera barnsligt og neyðarsligt.

Jógvan Sundstein vísti skilagott á, at Javnaðarflokkurin aftan á seinastu samráðingarnar kundi havt akslað seg av nýggjum. Tað kunnu teir gera enn. Atli Dam vísti eisini á okkurt, sum eg havi gloymt. Hann plagdi at siga, at málið skuldi búnast. Í summum førum var hetta rætt, men tað kravdi vaksið og ungt fólk, ið alla tíðina fylgdi við tí, so ein ikki lá sjóvarfallið av sær. Atli kundi brávenda og koma væl frá tí, men nú situr hann hálvgamal aftan leiktjøld. Soleiðis er lívið. Sjálvur siti eg í mínum lagi og skrivi míni lesarabræv og rakni rættuliga við. Eg eri liðugur við at skriva um blokkin. Tá ið eg byrjaði at skriva fyri einum mansaldri síðani, segði man altíð »danskar pengar«. Hvørki mær ella nøkrum øðrum tørvar at grundgeva fyri, at okkum ikki tørvar blokkin og um hansara skaðiliga árin á okkara búskap. Um vit gráta ella læa taka danir blokkin burtur. *Um fá ár er blokkurin horvin.* Ótrúligt, men *veruleiki.*

Ein løgin kensla, tú mást líka sum summa teg eina løtu. Fara upp at ganga. Drekka eitt eyka krúss av te og roykja eina pípu, hóast tú hevur roykt eina í morgun.

Í Donsk-føroysku orðabókini stendur: Befrielse = loysing. Ætlaði bara at skriva orðið befríilsi, men loysing er rættari. Eg kenni meg loystan frá hesum blokki. Hetta landsstýrið við sínum dugnaligu embætismonnum og teir løgtingslimir, sum so manniliga hava staðið aftan fyri tað, eisini Miðflokkurin og Jenis av Rana, hava rós og tøkk uppiborna.

Tey trý, Helena, Anfinn løgmaður og Høgni Hoydal hava klárað seg sera væl, hóast allar súðir ikki eru syftar. Millum fólk, uttan mun til partapolitikk, er virðingin fyri teimum trimum vaksin. Ofta hoyrir tú, at fólk viðganga, at tey ikki høvdu væntað, at tey kláraðu seg so væl. Fólk frøast ikki minst um, at tey arbeiða so væl saman. Vælsignaðar várvónir.

**Steinbjørn B. Jacobsen**

# Høgni Hoydal hevur eitt óforloyst Messias kompleks

• og persónliga frælsi og vælferð Føroya fólks sum offurlamb!

Eins og Mao við síni lítlu Reyðu gevur okkara propagandaministari út sína egnu "lítlu Grønu": "Myten om rigsfællesskabet", nevnir Høgni Hoydal danska bóklingin hjá sær, sum er 115 síður og uttan referansur ella tilvísingar. Ein partur er leystliga um Føroyar fyrr og nú, men størsti parturin er Høgna Hoydalsa persónliga "myta" um føroyingin og ríkisfelagsskapin. Sambært donsk-føroysku orðabókina hjá Stiðanum merkir "myte" : íspunnin søga, skrøggsøga, lygisøga ella leysasøga og vit finna allar merkingarnar umboðaðar í bóklinginum. Skrivingarlagið er lætt og eins og í "Vagttårnet" hjá Jehovas vitnum, stendur trúvirðið til trúgvandi.

Tað er ikki mín ætlan at ummæla bóklingin, tað hava onnur longu gjørt, men bert við nøkrum dømum at vísa á hvørjum argumentatiónsstøði okkara propagandaministari og varðaløgmaður arbeiðir á, har "målet helliger midlet"!

Sambært bóklinginum hevur ríkisfelagsskapurin ábyrgdina av øllum tí ónda sum hendir í Føroyum, og hevur ført til politiskt ábyrgdaloysi, fíggjarligt kollaps, asosial systemir og mentunarligt— og samleika skizofreni í Føroyum. Hetta er eitt kent ekkó frá tíðini aftur til fólkaatkvøðuna í 1946 um loysing frá Danmark. Loysingarhugaði fólk reistu tá land og ríki runt við sama boðskapi um, at ríkisfelagsskapurin við Danmark var rótin til alt ónt í Føroyum. Men tá samanum kom, tók bert ein triðingur av Føroya fólki undir við loysingini. Loysingarrørslan stovnaði í 1948 Tjóveldisflokkin, sum førdi seg fram við mottoinum: "loysing í morgin", resten grejer sig i sjøen.

Eitt skifti hevði loysingarrørslan tíðindablaðið, 14. septembur, men tvørrandi realpolitikkur og tann altíð afturvendandi nationalromantiska parolin "loysing í morgin" hevði / hevur lítla undirtøku millum Føroya fólk, so 14. septembur kollapsaði bæði fíggjarliga og politiskt. Loysingarrørslan hevði tó eisini onnur "ideologisk princippir" so sum: Donsku drotningina vildu teir ikki reisa seg upp fyri tíansheldur rópa hurrá fyri, men nú vilja teir sjálvbodnir inn undir skjúrti á Hennara Hátign! NATO høvdu danir og fan.. skapt, og í várkendum góðveðri varð gingin friðarmarchur niðan í Mjørkadal fyri ræða NATO? Seinasta nýggja er, at Føroyar skulu gerast limir í NATO um loysingin gerst veruleiki?

**Hin skizofreni føroyingurin**

"Den tvedelte færing" (síðu 50) ella skizofreni føroyingurin er ein fylgja av ríkisfelagssskapinum, sigur Høgni Hoydal. Men ein vanligur føroyingur hevur als ikki hesar trupulleikarnar at dragast við, tvørturímóti, tí í mongum førum er tað líka lætt ella lættari at flyta til Danmarkar enn at flyta innanoyggja í Føroyum. Í Danmark hava vit føroyingar eisini høvi til at menna okkum í altjóða høpi, samstundis sum vit eru á heimabana við øllum teimum fyrimunum, sum tað inniber.



Annars eru fleiri av okkara mest kveikjandi og fremstu umboðum innan skapandi list og tónlist úr Danmark, og onkur eisini úr hinum norðurlondum. Danmark hevur eisini í øldir savnað og varveitt eitt ótal av okkara mentunarligu dýrgripum, alt frá kvæðasøvnum til Kirkjubøstólar. Fleiri av hesum dýrgripum, sum annars helst vóru farnir fyri skeyti, eru nú á veg heimaftur, í tann mun vit trygt kunnu varveita teir. Tann mentunarligi stuðulin úr Danmark hevur bæði beinleiðis og óbeinleiðis havt ómetaliga stóran týdning fyri føroysku mentanini. Av dagsaktuellum mentunarligum stuðuli úr Danmark kunnu nevnast 2 mill. krónur til fornminnini í Koltri, 3 árslønir til yrkjaran, Tóroddur Poulsen, og har hanga ongir lepar við, sum kvøðið verður í Brókatátti. Tann mentunarliga skizofreniin er trupul at fáa eyga á.

Innan fyri tann rabiata partin av loysingarrørsluni, tann kommunistiskt inspireraða, hevur síðani Múrurin fall rátt ein óviss skizofren líknandi støða, bæði í mentunarligum og í samleika høpi. Kanska eru tað hesar stagneraðu kommunistarnar Høgni Hoydal hugsar um, tá hann skrivar um skizofrenar føroyingar?

**Lítil undirtøka fyri loysing**

Selektivar útsagnir fyri ikki at siga ósannar útsagnir eru ikki so fáar av í bóklinginum: "Dog viser alle meningsmålinger, at tre fjerdedele af vælgerne ønsker et selvstændigt Færøerne på et eller andet tidspunkt." (síðu 103). "Den danske blokstøtte, en milliard kroner årligt, er som helhed blevet sendt retur som afbetaling på renter og afdrag til staten." (síðu 88, stytt), ella "Når der tales til hjernen og rationaliteten, kan der således også skabes en nogenlunde konsensus (full semja) i den færøske befolkning. Konflikten opstår først, når der tales til maven." (síðu 106).

Í Íslandi var í 1918 og 1944 talan um næstan 100% semju ella konsensus um loysing frá Danmark, bæði í Altinginum og millum ìslendska fólkið, men Føroyar eru ikki Ísland! Í 1946 tók bert 1/3 av føroya fólki undir við loysing, og seinasta meiningsmáling í apríl 2000 vísir, at bert 25% av føroyingum taka undir við loysing, hóast vit nú í 2 ár hava havt ein full time propagandaministara við slanguni beint niður í landskassan. Propagandistiski framferðarhátturin hjá okkara loysingaministara og varaløgmanni hoyrir diktaturskipanum til og hevur onki við demokratiska siðvenju at gera.

Sjálvt okkara løgmaður er í loysingarmálum vorðin reduseraður til eitt ekkó hjá Høgna Hoydal, og stóri meirlutin av løgtingslimunum, sum løgmaður lovaði, skuldu standa aftanfyri nýskipanaruppskotið áðrenn farið varð niður at forhandla, er gloymdur, helst eftir boðum frá varaløgmanni.

Høgni Hoydal ákærir danir fyri at hava behandlað føroyingar sum "én homogen klump" (síðu 79/80), sjálvur tosar Høgni Hoydal, sum um hann átti allar føroyingar, sjálvt um hann reelt bert umboðar viljan hjá 25% av Føroya fólki. Persónliga frælsi føroyinga er størst innan fyri ríkisfelagsskapin eins og sosiala trygdarnetið eisini er tað, tí er so lítil undirtøka fyri loysing. Heldur frælsur í einum góðum felagsskapi enn ófrælsur og nassandi uttanfyri.

**Ein rættur føroyingur**

At arbeiða hjá tí almenna ella í einum banka ger ein føroyingur bert fyri penggarnar skyld (síðu 51), tí ein rættur føroyingur bóndast og fiskar, um ikki annað so í frítíðini, og kvinnurnar gera heimaarbeiði, sum tær hava gjørt í øldir. Øll hjálpa hvørjum øðrum við øllum, sambært Høgna Hoydal. Ikki eitt orð um at ullin, seyðaskinnini og avroðini verða brend, tí tað hevði spolerað romantisku dreymamyndina ella hvørvimyndina av Høgna Hoydalsa føroysku "Utopia".

Tríggir av okkara frægu búskaparfrøðingum, Bjarni Olsen, sparikassastjóri og fyrrverandi stjóri á hagdeildini, Magni laksafoss, medskrivari til Hvítubók og forskari og Kári Petersen, fyrrverandi fíggjarstjóri í Landsstýrinum og nú MBA lesandi í London, hava ávarað ímóti verandi loysingarætlan, sum verandi alt ov bjartskygda. Teir siga samanfallandi, at ein loysing nú verður Føroya fólki og Føroya landi til falls búskaparlig og við teimum óhepnu fylgjum tað førir við sær: Búskaparlig stagnatión við lækkandi livifóti og stórari fólkafráflyting av tí yngra fólkinum v. m.

Í uppriti til fyrstu samráðingarrundu við Nyrup vísti Høgni Hoydal á, at Danmark tjenti multiplar milliardir krónur uppá Føroyar, men stutt aftaná í danskari sjónvarp sending, Profilen, segði Høgni Hoydal, at Danmark spardi pening við at geva Føroyum loysing? So einfalt er tað!

Høgni Hoydal hevur eins og fasturin í Danmark, Annika Hoydal, góðar teatralskar gávur, men ætlar hann sær at spæla sítt óforloysta Messias kompleks út, hevur hann valt skeivan leikpall. Persónliga frælsi og vælferð Føroya fólks er ov høgur prísur fyri Høgna Hoydalsa óforloysta Messias kompleks!

Ein stórur meiriluti av Føroya fólki ynskir eina nýskipan innan fyri ríkisfelagsskapin, og hesum ynski tekur danski forsætisráðharrin og danska fólkatingið undir við.

**Regin Eikhólm**

## Nøvn komin í bland...

Av misgávum er Reynatúgva og Reynatrøð komið í bland í greinini hjá Dan R. Petersen í blaðnum í týsdagsblaðnum. Tað skal sjálvandi vera Reynatúgva. Dan biðjur orsaka mistakið.